# Broytt býarmynd

Her eru tvær myndir frá Birgar Johannessen, onnur er frá umleið 1929/30, og hin er tikin í ár. Myndirnar eru tiknar á havnaøkinum í Havn.

Brúgvin frá Skansanum og yvir á Krákustein varð gjørd einaferð í 1920-unum. Fyri at fáa koyrisamband við havnaøkið var sprongt gjøgnum bergið, og brúgvin gjørd fyri at hava samband millum økið á Krákusteini og Skansan. Brúgvin varð tikin niður í 1952.

Hóast næstan 80 ár eru millum hesar myndirnar, sæst at stoypta fundamentið, tí megin sum Skansin er, stendur enn, 56 ár eftir at brúgvin varð sprongd burtur. Mynstrið á klettinum er ikki broytt øll hesi árini.

Á ovaru myndini eru menn til arbeiðis í grótbrotinum, meðan ein lastbilur koyrir undir brúnni. Grótið var m.a. nýtt til bygging av Molanum.

Myndirnar sýna, at nógv er broytt hesi árini. Gomlu myndina eigur Fornminnissavnið (nr. 8525F030), og nýggju myndina hevur Birgar Johannessen tikið.



